

*Per Stig Møller og Jóannes Eidesgaard á tíðindafundi í Skansapakkhúsinum í Tinganesi í morgun*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Neyðugt við størri marknaðaratgongd

**– Tað er sera gott, at tit føroyingar royna at tryggja tykkum størri marknaðaratgongd úti í heimi. Treytin fyri at liva upp til Visjón 2015 ætlanina – ella fyri at fáa eitt betri samfelag, er at til alsamt nøra um hendan partin og at tit líta eftir, hvussu onnur samfeløg skipa seg, fyri at gera tykka samfelag til eitt av teimum bestur, sigur Per Stig Møller, danskur uttanríkisráðharri**

RÁÐHARRAVITJAN
*Eirikur Lindenskov*
*Eirikur@sosialurin.fo*

Sum vera man vóru Muhammedstekningarnar umrøddar í Tinganesi í morgun, tá løgmaður Jóannes Eidesgaard og Per Stig Møller, danski uttanríkisráðharrin hittust til árliga fundin, sum hildin verður millum løgmann og uttanríkisráðharran, sum á hesi árligu vitjan eisini hittir uttanlandsnevndina, sum verður kunna um úttanríkispolitisk mál.

Løgmaður varð spurdur, um hann kendi til nakað konkret mál ella nakra konkreta hending, har føroyingar ella føroysk áhugamál hava verið merkt av boykottinum í kjalarvørrinum av Muhammedsteknungunum. Men tað kennir løgmaður einki til.

– Eg havi loypandi verið kunnaður um tað, sum er farið fram millum uttanríkisráðið og fólkatingið, so vit hava kunnað fylgt málinum, sigur løgmaður.

Á fundinum í Tinganesi í morgun prátaðu løgmaður og uttanríkisráðharrin m. a. um ymisk viðurskifti, sum eru viðkomandi fyri føroyskan politikk.

– Eg havi kunnað hann um visiónsætlanina og tað, at Føroyar finna sín leiklut í Evropa. At Føroyar gerast partur av tí globaliseraða heiminum, um onnur viðurskifti, eitt nú teir sáttmálar, sum ikki endialiga eru komnir upp á pláss, t. d. russlandssáttmálan. Eisini havi eg kunnað hann um íslandssáttmálan, sum liggur í løgtinginum, um fráboðanina til ST, sum hevur verið frammi í føroyskum politikki, um markið millum Føroyar og Ísland, eisini um viðurskiftini úti á Hatton-Rockall platonum, um rækjumálið millum Føroyar og Kanada, og um viðurskiftini í fiskiskapinum við Svalbard, sigur Jóannes Eidesgaard.

Eisini hevur løgmaður kunnað hann um sendinevndina, sum var í India og kannaði, um møguleikar vóru fyri at fáa samstarv harúti.

Per Stig Møller fegnast um, at Føroyar ikki hava verið ávirkaðar av Muhammedorrustuni.

– Føroyar hava verið kunnaðar alla tíðina, sigur Per Stig Møller. Uttanríkisráðharrin hevur annars ta fatan, at Føroyar als ikki hava verið partur av hesum stríðnum, og tískil hevur hetta ikki rakt føroyingar og føroysk áhugamál.

– Eg kann eisini staðfesta, at vitjanin hjá løgmanni í India gekk væl – uttan at hetta á nakran hátt ávirkaði vitjanina. Eg kann so bara fegnast um, at føroyingar kunnu halda fram við slíkum samstarvi úti verð uttan at verða ávirkað av hesum, heldur Per Stig Møller.

– Eg vóni eisini at vit koma ígjøgnum hesa kreppuna við tekningunum skjótt, hóast einki bendir á tað. Hóast trýstið er linkað, so er tað ikki av enn, og danskar vørur verða framvegis boykottaðar. Kreppan hevur tó ikki breitt seg, men hon ikki hevur heldur ikki lagt seg. So kreppan heldur fram, sigur danski uttanríkisráðharrin.

– Men eg fegnist um, at hon ikki hevur gjørt føroyingum skaða, sigur hann.

Sjónvarpið spurdi uttanríkisráðharran, um tað eru góðir møguleikar hjá føroyingum at gera handilsavtalur uttan um Danmark.

– Tað hava føroyingar góðar møguleikar fyri. Føroyingar hava arbeitt við at fáa góðar avtalur við russar, svarandi til tað, onnur hava. Kunnu føroyingar økja sín handil á henda hátt, so er tað bara gott. Og at fara til India er eisini frálíkt! Vit hava eisini tosað um Visjón 2015 og okkara globaliseringsstrategiir, sum vit eru í ferð við at leggja fyri okkara framtíðarætlanir á útflutningsøkinum. India er ein stórur útflutningsmarknaður, so eg haldi, at tað er frálíkt, at føroyingar leita handavegin eisini, sigur Per Stig Møller.

Uttanríkisráðharrin vísti eisini á, at tá hann í fjør var í Japan, var Grønland eisini har við einum átaki har, og vit vilja fegin hjálpa til við slíkum. Grønland hevur eisini gjørt tað uttan okkum, eitt nú í Washington. Og at føroyingar gera slík framtøk er bara gott, heldur hann.

Per Stig Møller sigur eisini, at tað er sera gott við eini ætlan, so sum Visjón 2015 á tekniborðinum. Vit eru øll noydd at vera við til at finna út av, hvussu vit mynda framtíð okkara. Men hetta kann ikki gerast, uttan at tað er treytað av, hvussu tey hava tað í øðrum samfeløgum. Taka vit ikki tað allar besta, sum tey hava í øðrum og betri samfeløgum – og kopiera tað, so er tað samfelagið ikki nóg gott, heldur Per Stig Møller.

– Tí fegnist eg um hesar framtíðarætlanirnar hjá tykkum. Tað er so umráðandi, at tit tryggja tykkum størri marknaðarpart úti í heimi og alsamt nøra um hann – tað er jú treytin fyri einum sterkari samfelag, segði Per Stig Møller, danskur uttanríkisráðharri, tá hann hitti fjølmiðlarnar í Tinganesi í morgun, áðrenn hann fór á fund við uttanlandsnevndina hjá Løgtinginum.

## FAKTA

### PER STIG MØLLER

Føddur 1942
Sonur fyrrverandi fíggjarmálaráðharran Poul Møller og Lis Møller, sum var journalistur. Bæði vóru tey fólkatingslimir

1961 studentur
1967 Mag. art. (sml. litteraturvidenskab, Københavns Universitet)
1973 Dr.phil.

Politiska lívsleiðin
1960 – 1961 Formaður fyri Konservative Gymnasiaster
1961 – 1962 Næstformaður fyri Konservative Studenter
1970 – 1972 Studenterforeningens ledende senior
1983 – 1989 Formaður fyri Folkeligt Oplysnings Forbund
1984 – Fólkatingslimur fyri Det Konservative Folkeparti
1985 – 1989 Stjórnarlmur í Det Konservative Folkeparti
1987 – 1990 Limur í Evroparáðnum
1990 – 1993 Umhvørvisráðharri í stjórnini hjá Poul Schlüter
1994 – 2001 Limur í uttanpolitiski nevndini
1994 – 1996 Formaður fyri Sikkerhedspolitisk Udvalg
1997 – 1998 Formaður í Konservativa Flokkinum
1997 – 1998 Politiskur leiðari í Den Konservative Folketingsgruppe
1998 – 2001 Uttanpolitiskur framsøgumaður Síðani 27. november 2001 uttanríkisráðharri í stjórnini hjá Anders Fogh Rasmussen

Fólkatingsvalevni fyri teir Konservativu í Gentoftevaldøminum frá 1983 og síðani 1987 í Frederiksberg Slotskreds.

**Vinnuroyndir:**
1973 - 1974
Kulturredaktør ved Danmarks Radio
1974 - 1976
Lektor ved Sorbonne, Paris
1974; 1976 - 1979
Souschef ved Danmarks Radios kultur- og samfundsafdeling
1979 - 1984
Programchef hos Programdirektøren
1985 - 1986
Næstformand for Radiorådet
1986 - 1987
Formand for Radiorådet
1984 - 2001
Kommentator ved Berlingske Tidende

Per Stig Møller skrivað og útgivið nógv bókmentaligt tilfar, eins og hann hevur finigð fleiri virðislønir